Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting: 27.01.2026
Mál nr.: 24/00752
Málsviðgjørt: HW

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 14, stk. 4. Landsstýrismaðurin skipar fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki eftir nærri ásettum reglum. Landsstýrismaðurin kunnger miðalúrslitið fyri landið í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki og almannakunngerð samstundis frágreiðing um royndarúrslitið. Royndarúrslitini hjá einstaka næminginum, sbr. tó stk. 8, flokkinum ella skúlanum, eru í trúnaði. Starvsfólk skúlans o.o., sum taka ímóti ella viðgera úrslitini í landsroyndini, hava tagnarskyldu um hesar upplýsingar.	**§ 1** Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 7. mai 2025, verður § 14, stk. 4 orðað soleiðis: "*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið skipar fyri landsroynd í føroyskum og støddfrøði í 4. og 6. flokki, og í náttúru og tøkni í 6. flokki eftir nærri ásettum reglum. Landsstýrisfólkið kunnger miðalúrslitið fyri landið í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni og almannakunnger samstundis frágreiðing um royndarúrslitið. Royndarúrslitini hjá einstaka næminginum, sbr. tó stk. 7, flokkinum ella skúlanum, eru í trúnaði. Starvsfólk skúlans o.o., sum taka ímóti ella viðgera úrslitini í landsroyndini, hava tagnarskyldu um hesar upplýsingar."